

# Góðgæti frá gentunum í

Stákan í køkinum er nakað av tí besta við jólunum. Hetta halda tey í øllum førum í Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík, har tey fyrireika høgtíðina við at gera mat og baka, pynta og seyma. Og so ikki at forgloyma øll tey herligu sløgini av góðgæti, sum verða gandað undan hondunum á næmingunum, so goymslurnar nú eru á tremur við dósum og krukkum við alskyns freistandi slikkaríi.

Áhugin fyri Húsarhaldsskúlanum er støðugt vaksandi og seinastu árini hevur bíðilistin verið so langur, at bert ein lítil partur av umsøkjarunum sleppa inn.

Jóhanna á Tjaldrarfløtti, skúlaleiðari, greiðir frá, at í fjør fingu tey nærum hundrað umsóknir, men pláss var bara fyri 21.

– Tí bólka vit umsóknirnar geografiskt og kasta lut, so næmingar úr øllum landinum sleppa við á hvørt lið, sigur Jóhanna á Tjaldrarfløtti, sum saman við Elisabeth Akursmørk er bókaaktuell við bakibókini *Søtt og Leskiligt*.

Vit heittu á Húsarhaldsskúlan um at geva lesarum okkara nøkur hugskot til jólagóðgæti og undir kønari vegleiðing frá teimum báðum, Jóhonnu á Tjaldrarfløtti